# Ikki meir til SvF

**Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við mentamálum, sigur seg ikki duga at síggja, at Sjónvarpið fær meira pening í núverandi støðu**

SVF
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*



*Tað er ongin ivi um, at Sjónvarpið má liva við teimum pengunum, sum teir hava*

Sjónvarp Føroya hevur kunngjørt sína ársfrágreiðing fyri 2003. Føroya Løgting gjørdi av at strika játtanina til tøkniíløgur, og Sjónvarpið sigur í frágreiðingini, at tað "helst verður noytt at fíggja hesar íløgur um raksturin."

Harumframt verður sagt, at "støðan viðvíkjandi framtíðini hjá SvF er enn líka óavklárlað, sum hon var, tá núverandi leiðsla tók við í august 2001. Eingin politisk avgerð er tikin, og einki politiskt kjak hevur verið um framtíðarstøðuna og uppgávurnar hjá einum almennum føroyskum sjónvarpið…

## Minni føroyskt

…Politiski myndugleikin má tí taka støðu til, um vit skulu hava eitt sjónvarp, sum skal dúva upp á teir umleið 8 tímarnar av føroyskum tilfari um vikuna, sum kunnu framleiðast við verandi fíggjarorku, ellu um vit skulu hava eitt føroyskt sjónvarp við eini munagóðari skrá, ið er sett saman av føroyskum tilfari og útlendskum sendingum, sum eru týddar til føroyskt."

## Undarligt

– Eg haldi, at tað er eitt sindur undarligt at koma við einum politiskum boðskapi í einari ársfrágreiðing. Eg ætli mær at taka ein fund við sjónvarpsstjóran um hetta málið. Tað stendur í samgonguskjalinum, at vit skulu endurskoða kringvarpslógina, og tað verður arbeitt við hasum økinum. Tað verður viðgjørt, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður.

## Fólksliga kravið

Sjónvarp Føroya skrivar í frágreiðingini, at tað var "ikki gjørligt at standa ímóti fólksliga og politiska kravinum um, at tann stóra økingin í hyggjaragjaldinum skuldi síggjast aftur í øktum tali av tímum á skýggjanum."

Men nú røkist alt fyri, at føroyingar fáa minni føroyskt tilfar, um onki verður gjørt frá politiskari síðu. SvF sigur, at virksemið hjá Sjónvarpinum komandi ár verður minni enn tað var, áðrenn SvF gjørdi av at hækka sjónvarpsgjaldið. Tað vil siga minni fyri meir.

## Ikki meir

– Tað er klárt, at tað er ein alvorligur boðskapur. Men eg ivist í, um tað er so ógvusligt. Eg dugi ikki at síggja, at vit fáa skaffað Sjónvarpinum meira pengar í løtuni, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður. Yvirskotið hjá Sjónvarpi Føroya í 2003 gjørdist kr. 179.000. Næstan 98 % av hesum skuldi Sjónvarp Føroya gjalda til landskassan. Tískil varð veruliga yvirskotið hjá SVF kr. 4.000.

– Tað er ongin ivi um, at Sjónvarpið má liva við teimum pengunum, sum teir hava. Um tað verður minni sjónvarp, tað dugi eg ikki at taka støðu til, sigur Jógvan á Lakjuni.

## Brúk fyri 100 milliónum

– Vit vilja vísa støðuna, sum hon er. Verandi fíggjarorka røkkur til umleið átta tímar av framleiðslu um vikuna, og tann nøgdin økist ikki við verandi fíggjargrundarlag, sigur Mikkjal Helmsdal, stjóri í SvF.

– Harumframt hevur Sjónvarpið virkað í 20 ár, uttan at nakrar munandi íløgur í høvuðsskipanirnar í framleiðslu og heldur ikki í sendinetið. Vit eru komin hartil, at hesar skipanir eru so niðurslitnar, at tað er ein spurningur um, nær framleiðslan steðgar upp, sigur Mikkjal Helmsdal.

– Skulu vit hava eina fulla skrá við føroyskum tilfari, so krevst ein fíggjarætlan upp á 100 milliónir krónur um árið, sigur Mikkjal Helmsdal, stjóri í SvF.

**-hkm**

NORÐOYA SPARIKASSI

## Roknskapur 1. hálvár 2004

### Rakstrarroknskapur 1. hálvár

| | 2004 1.000 DKK | 2003 1.000 DKK |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur o.a. | 34.231 | 35.806 |
| Rentuútreiðslur o.a. | 7.295 | 8.851 |
| **Netto rentuinntøkur** | **26.936** | **26.955** |
| Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 39 | 44 |
| Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 1.808 | 1.459 |
| Útreiðslur til kostnað og provisión | 136 | 58 |
| **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **28.647** | **28.400** |
| Virðisjavnan av lánsbrøvum, gjaldoyra o.ø. | -310 | 3 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 214 | 217 |
| Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. | 14.738 | 14.931 |
| Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 475 | 463 |
| Aðrar vanligar útreiðslur | 55 | 323 |
| Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 2.212 | 248 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **11.071** | **12.655** |
| Skattur | 2.214 | 2.529 |
| **Hálvársúrslit** | **8.857** | **10.126** |

### Fíggjarstøða hin 30. juni

| | 2004 1.000 DKK | 2003 1.000 DKK |
|---|---|---|
| **Ogn** | | |
| Kassapeningur og innistandandi í tjóðbankum | 30.860 | 10.732 |
| Ogn hjá fíggjarstovnum | 44.379 | 58.967 |
| Útlán | 898.724 | 839.776 |
| Lánsbrøv | 174.738 | 213.253 |
| Partabrøv | 724 | 729 |
| Kapitalpartur í assosieraðum fyritøkum | 15.596 | 14.650 |
| Ítøkiligar ognir | 10.601 | 8.763 |
| Aðrar ognir | 2.800 | 3.731 |
| **Ogn tilsamans** | **1.178.422** | **1.150.601** |
| **Skuld og eginpeningur** | | |
| Skuld til peningastovnar | 0 | 0 |
| Innlán | 914.343 | 900.648 |
| Onnur skuld | 9.871 | 11.900 |
| Avsetingar til útreiðslur | 2.931 | 3.023 |
| **Skuld tilsamans** | **927.145** | **915.571** |
| Eginpeningur | 242.420 | 224.904 |
| Hálvársúrslit eftir skatt | 8.857 | 10.126 |
| **Eginpeningur tilsamans** | **251.277** | **235.030** |
| **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **1.178.422** | **1.150.601** |
| **Tøl, ið ikki eru tikin við í fíggjarstøðuna** | | |
| Ábyrgdir og aðrar skyldur | 79.862 | 81.076 |

Ósávegur 1 Postboks 149 FO-700 Klaksvík Tel. 475000 Fax 476000 ns@ns.fo www.ns.fo



# Proformasølur skapa arbeiðsloysi

**Øll arbeiðarafeløgini eru nú komin við eini áheitan til landsins myndugleikar um at taka neyðugu stigini til at forða fyri, at so nógvur ótilvirkaður fiskur fer av landinum og skapar arbeiðsloysi. Men forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelagi, Ingeborg Vinther, hevur einki konstruktiv uppskot um, hvussu trupulleikin skal loysast. – Tað er ábyrgdin hjá politiska myndugleikanum, sigur fakfelagsleiðarin. Veruligi trupulleikin tykist vera í sonevndu proformasølunum**

ÁHEITAN
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*Neyðarróp er komið frá Arbeiðarafeløgunum, men eingin konstruktiv loysn er at hoyra.. - Okkum tørvar nýhugsan og árræði frá politiskari síðu at taka neyðugu stigini til at forða fyri, at ogn Føroya fólks - fiskurin - verður tikin úr hondum okkara og latin øðrum samfeløgum, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelagi*

Í eini yvirlýsing mótmæla føroysku arbeiðarafeløgini nú, at so nógvur ótilvirkaður fiskur fer av landinum, tí hetta er sambært teimum ein beinleiðis orsøk til vaksandi arbeiðsloysi.

"Sum støðan er nú, so verða arbeiðspláss útflutt úr Føroyum saman við fiskinum, tí tann fiskur, sum sjálvsagt skuldi verið tilvirkaður og góðskaður her heima, verður fluttur uttanlands, har hann skapar arbeiði til túsundtals arbeiðsfólk", stendur m.a. at lesa í áheitanini.

Talan hevur leingi verið um ein trupulleika viðvíkjandi keypi og sølu av fiski í Føroyum, og ein nevnd arbeiðir í løtuni við eini loysn á sonevndu proformasølunum, sum viðgjørdar eru seinni í greinini.

## Einki uppskot

Men forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelagi, Ingeborg Vinther, hevur einki ítøkiligt uppskot um, hvat kundi verið gjørt at betra um viðurskiftini, og hon vil ikki útdýpa nakað av tí, sum stendur í áheitanini. Sostatt eru arbeiðarafeløgini hóast neyðarrópi ikki eitt íkast til kjakið um sølu og keypi av fiski í Føroyum.

– Tað er uppgáva politikarans at loysa trupulleikan og skaðiligu samfelagsligu avleiðingarnar av, at so nógvur ótilvirkaður fiskur fer av landinum. Arbeiðsloysið er vaksandi, vit útflyta nógv arbeiðspláss hvønn dag, og hesum mótmæla vit, sigur Ingeborg Vinther, sum ikki vil koma nærri inn á, hvørja ítøkiliga loysn arbeiðarafeløgini síggja fyri sær.

Ingeborg Vinther sigur, at áheitanin er sent øllum tí politiska myndugleikanum, fyrst og fremst Føroya Landsstýri, tí tað eru teir, sum eru valdir til at loysa slíkar trupulleikar.

## Tungt hjá ALS

Beinharði fakfelagsleiðarin úr Vági sigur seg stúra fyri, hvussu leingi ALS-kassin megnar at halda fram at halda neyðini burtur frá durunum hjá vaksandi arbeiðsleysa skaranum í Føroyum.

– Vit vita jú øll, at arbeiðsloysisstuðulin (ALS) bert er ein avmarkað neyðloysn, og tað gerst tyngri og tyngri við vaksandi arbeiðsloysinum. Um gongdin heldur fram, m.a. orsakað av ótilvirkaða fiskinum, sum fer av landinum, verður tað skjótt tungt hjá ALS-kassanum, sigur Ingeborg.

Hon vísir á, at øll Suðuroyggin er í andaleypi, og at líknandi eyðkenni eru at síggja aðrastaðni í landinum.

## Tímalønin eingin orsøk

Serfrøðingar hava víst á, at høga tímalønin hjá arbeiðarastættini er orsøkin til, at so mong virki liggja still í Føroyum í dag. Vaksandi tímalønin hevur sambært eitt nú stjóranum í Føroya Sparikassa skaða kappingarførið hjá virkjunum so mikið, at tey ikki megna at keypa fiskin fyri tann minstaprís, reiðararnir áseta, og so verður farið t.d. til Skotlands at selja fyri størri vinning. Tímalønirnar eru sum kunnugt farnar upp við støði í arbeiðaraverkføllunum seinnu árini, og spurd, um tey ikki sjálvi partvís hava skuld í støðuni, er Ingeborg greið.

– Tað ereinki minni enn vanvirðandi og mannminkandi at geva lægst lønta arbeiðaraflokkinum skuldina fyri, at so nógvur ótilvirkaður fiskur fer av landinum, og at arbeiðsloysið veksur. At tímalønin skal vera orsøkin til vánaliga kappingarførið, er ein bílig undanførsla, sigur Ingeborg.

## Nýhugsan

Spurd, hvat hon so metir vera orsøkina til trupulleikan, eftirlýsir fakfelagsforkvinnan eina hugburðsbroyting.

– Okkum tørvar nýhugsan og árræði frá politiskari síðu at taka neyðugu stigini til at forða fyri, at ogn Føroya fólks - fiskurin - verður tikin úr hondum okkara og latin øðrum samfeløgum. Politikararnir eru valdir til júst at loysa slíkar trupulleikar, men teir lata standa til, og tað góðtaka vit ikki, sigur Ingeborg Vinther.

## Proformasølur

Í longri tíð hevur talan verið um dúgligt kjak millum Føroya Arbeiðsgevarafelag, føroyskar framleiðarar, Reiðarafelagið og Ráfiskaseljarafelagið um keyp og sølu av fiski í Føroyum, og serliga hevur kjakið gingið fyri seg í Dimmalætting.

Sambært lógini skulu minst 75% av fiskinum bjóðast út í Føroyum við endamálinum at forða fyri, at so nógvur ótilvirkaður fiskur fer av landinum, men í praksis fer tann størsti parturin av ogn Føroya fólks, fiskurin, ótilvirkaður av landinum og skapar arbeiðspláss uttanlanda, meðan føroysk virki liggja still.

Ein orsøk, sum Arbeiðsgevarafelagið og føroyskir framleiðarar hava víst á, er, at fiskurin verður bjóðaður út í Føroyum fyri ein prís, sum eingi føroysk virki megna at keypa fyri, og mangan er talan um sama keypara og seljara. Hetta verður gjørt, tí avreiðingarprísirnir í t.d. Skotlandi eru hægri. Mangan er fiskurin á veg til onnur lond, í somu løtu sum hann verður bjóðaður út í Føroyum, og hetta tykist vera ein tigandi, kartell líknandi samtykt í føroysku fiskivinnuni, har endamálið við lógini um vinnuligan fiskiskap als ikki verður nátt. Fyri at fáa ein betri prís hava reiðarar og skiparar funnið hol i lógini, og hetta eru tær sonevndu proformasølurnar.

## Marknaðarkreftirnar

Sambært t.d. Arbeiðsgevarafelagnum er útbjóðingin í Føroyum bert eitt útflutningsloyvi, tí útbjóðingin verður tillagað soleiðis, at einki føroyskt virki er ført fyri at keypa. Hetta er sjálvsagt ein útgáva av søguni, sum t.d. Jákup Sólstein og Árni Joensen umboðandi ávikavist Reiðarafelagið og Ráfiskakeyparafelagið ikki brýggja seg um. Teir siga, at um føroysku keypararnir bjóða nóg høgan prís, fer ikki ein stertur av landinum, og at seljarin sjálvandi fer hagar, vinningurin er størstur við støði í marknaðakreftunum, antin í Føroyum ella uttanlanda. Allir tykjast tó verða samdir um, at støðan ikki er nøktandi.

## Loysnin kemur í heyst

– Ein nevnd arbeiðir við trupulleikanum við stóru mongdini av útfluttum ótilvirkaðum fiski, og uppskot um møguliga loysn kemur helst í heyst, sigur Bjørn Kalsø, fiskimálaráðharri

Landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum sigur, at enn er ov tíðliga at úttala seg um, hvørjar ítøkiligu loysnirnar vera í málinum um sokallaðu proformasølurnar og ótilvirkaða fiskin, sum í stórum nøgdum fer av landinum.

– Støðan skal broytast, tað verður arbeitt við málinum, og vónandi fer tað ikki at líða ov langt út á heystið, áðrenn møguligar loysnir koma á borðið, sigur Bjørn Kalsø.

Fiskimálaráðharrin er ikki nøgdur við núverandi støðu, sum ikki fullfíggjar endamálið við lógini um, at 75% av fiskinum skal bjóðast út í Føroyum.

– Mín uppgáva er m.a. at syrgja fyri javnbjóðis kapping, og kappingin tykist ikki vera í hásæti nú, sigur Bjørn Kalsø. Hann ivast eisini í, um so stórur munur er á prísinum í Føroyum og uttanlanda.

– Men allir partar skulu hoyrast í málinum, áðrenn nøkur niðurstøða verður gjørd, sigur ein fáorðaður landsstýrismaður við fiskivinnumálum at enda.

**HíS**